## Støðan, danska superligan

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Brøndby | 18 | 12 - 4 - 2 | 44 | 11 | 33 | 40 |
| 2 | FCK | 18 | 9 - 6 - 3 | 29 | 16 | 13 | 33 |
| 3 | AB | 18 | 8 - 8 - 2 | 30 | 18 | 12 | 32 |
| 4 | AaB | 18 | 9 - 3 - 6 | 28 | 27 | 1 | 30 |
| 5 | Esbjerg | 18 | 9 - 2 - 7 | 28 | 26 | 2 | 29 |
| 6 | FCM | 18 | 6 - 7 - 5 | 25 | 17 | 8 | 25 |
| 7 | OB | 18 | 6 - 7 - 5 | 27 | 27 | 0 | 25 |
| 8 | Viborg | 18 | 4 - 8 - 6 | 21 | 23 | -2 | 20 |
| 9 | Vejle | 18 | 4 - 4 - 10 | 22 | 45 | -23 | 16 |
| 10 | AGF | 16 | 3 - 5 - 8 | 17 | 26 | -9 | 14 |
| 11 | Lyngby | 18 | 2 - 8 - 8 | 18 | 32 | -14 | 14 |
| 12 | Silkeborg | 17 | 2 - 4 - 11 | 13 | 29 | -16 | 10 |

Føroyskir leikarar: Johan Byrial Hansen (OB), Christian Høgni Jacobsen (OB), Todi Jónsson (FCK)

## Støðan, hollendska toto-deildin

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Excelsoir + | 16 | 12 - 2 - 2 | 36 | 11 | 25 | 38 |
| 2 | RBC Roo'daal | 16 | 9 - 5 - 2 | 38 | 18 | 20 | 32 |
| 3 | BV Veendam | 16 | 9 - 4 - 3 | 32 | 22 | 10 | 31 |
| 4 | Emmen | 16 | 9 - 4 - 3 | 28 | 18 | 10 | 31 |
| 5 | Cambuur/L. | 16 | 9 - 3 - 4 | 26 | 14 | 12 | 30 |
| 6 | ADO Den Haag | 16 | 8 - 5 - 3 | 23 | 13 | 10 | 29 |
| 7 | FC Zwolle | 16 | 8 - 5 - 3 | 28 | 20 | 8 | 29 |
| 8 | Haarlem | 16 | 7 - 4 - 5 | 21 | 20 | 1 | 25 |
| 9 | Dordrecht '90 | 16 | 6 - 4 - 6 | 32 | 25 | 7 | 22 |
| 10 | FC Volendam | 16 | 6 - 3 - 7 | 28 | 23 | 5 | 21 |
| 11 | Storm/Telstar | 16 | 5 - 4 - 7 | 22 | 20 | 2 | 19 |
| 12 | G.A. Eagles | 16 | 4 - 5 - 7 | 26 | 36 | -10 | 17 |
| 13 | MVV | 16 | 4 - 4 - 8 | 20 | 27 | -7 | 16 |
| 14 | VVV | 16 | 5 - 0 - 11 | 27 | 34 | -7 | 15 |
| 15 | Helmond Sp. | 16 | 3 - 6 - 7 | 13 | 26 | -13 | 15 |
| 16 | Heracles A. | 16 | 4 - 2 - 10 | 20 | 27 | -7 | 14 |
| 17 | Eindhoven | 16 | 2 - 3 - 11 | 19 | 45 | -26 | 9 |
| 18 | Top/Oss | 16 | 2 - 1 - 13 | 11 | 51 | -40 | 7 |

Perioduvinnarnari eru merktir »+«

Føroyskir leikarar: Súni Olsen (FC Zwolle)

## Støðan, enska 3. deild

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Plymouth | 21 | 13 - 6 - 2 | 31 | 11 | 20 | 45 |
| 2 | Mansfield | 21 | 12 - 5 - 4 | 35 | 22 | 13 | 41 |
| 3 | Hull C. | 21 | 11 - 7 - 3 | 36 | 20 | 16 | 40 |
| 4 | Rochdale | 21 | 11 - 6 - 4 | 32 | 21 | 11 | 39 |
| 5 | Luton | 20 | 11 - 3 - 6 | 40 | 27 | 13 | 36 |
| 6 | Shrewsbury | 21 | 10 - 4 - 7 | 31 | 24 | 7 | 34 |
| 7 | Scunthorpe | 21 | 8 - 8 - 5 | 36 | 23 | 13 | 32 |
| 8 | R&D | 21 | 7 - 9 - 5 | 23 | 20 | 3 | 30 |
| 9 | Kidderm. | 20 | 8 - 5 - 7 | 19 | 18 | 1 | 29 |
| 10 | Cheltenham | 21 | 7 - 8 - 6 | 30 | 30 | 0 | 29 |
| 11 | Darlington | 21 | 8 - 5 - 8 | 27 | 30 | -3 | 29 |
| 12 | Hartlepool | 21 | 8 - 4 - 9 | 25 | 18 | 7 | 28 |
| 13 | Leyton O. | 21 | 7 - 6 - 8 | 28 | 31 | -3 | 27 |
| 14 | Exeter | 21 | 7 - 6 - 8 | 23 | 34 | -11 | 27 |
| 15 | Lincoln C. | 21 | 5 - 9 - 7 | 22 | 23 | -1 | 24 |
| 16 | Southend | 21 | 7 - 3 - 11 | 23 | 26 | -3 | 24 |
| 17 | Swansea | 21 | 6 - 5 - 10 | 26 | 34 | -8 | 23 |
| 18 | Oxford Utd. | 21 | 5 - 7 - 9 | 20 | 25 | -5 | 22 |
| 19 | Macclesfield | 21 | 5 - 7 - 9 | 19 | 28 | -9 | 22 |
| 20 | York | 21 | 6 - 4 - 11 | 25 | 37 | -12 | 22 |
| 21 | Bristol R. | 21 | 5 - 6 - 10 | 15 | 25 | -10 | 21 |
| 22 | Torquay | 21 | 6 - 3 - 12 | 16 | 31 | -15 | 21 |
| 23 | Carlisle | 21 | 4 - 7 - 10 | 18 | 27 | -9 | 19 |
| 24 | Halifax | 21 | 4 - 7 - 10 | 15 | 30 | -15 | 19 |

Føroyskir leikarar: Julian Johnsson (Hull C.)

# Eingin føroyingur á vøllinum

**FCK sýndi stórspæl, tá teir í seinasta heimadystinum í ár vundu burtur úr AaB**

SUPERLIGA

*Jákup Mørk*

Danska superligan fer nú í vetrarfrí, og hóast FCK enn hevur ein dyst eftir móti Borussia Dortmund, so var talan leygardagin um seinasta heimadystin á árinum.

Áskoðarar felagsins kundu neyvan krevja meira enn tað, sum teir fingu leygardagin, tí FCK spílaði seg veruliga út. Longu tíðliga í dystinum høvdu bæði Peter Møller og Thomas Røll góðar møguleikar, men farast skuldi fram við hálva tímanum, áðrenn heimaliðið loksins legði seg á odda við einum máli frá Christian Poulsen.

Beint sum seinni hálvleikur byrjaði, økrti Morten Bisgaard, og Peter Møller slerdi sigurin rimmarfastan fáar minuttir seinni.

### Eingin føroyingur

Christian Høgni Jacobsen var ikki í hópinum, tá Esbjerg á heimavølli mátti taka til takkar við einum greiðum 2-0 tapi móti Vejle. Fyri Esbjerg merkti hetta, at týðandi stig varð mist í stríðnum um europeisku plássini, meðan Vejle fyri fyrst slapp sær upp um niðurflytingarstrikuna.

Triði føroyinguin í superliguni, Johan Byrial Hansen, var heldur ikki á vøllinum, tá OB á heimavølli spældi 2-2 móti AB. Tað hevði nokk einki forgjørt verið í, at gestirnir fóru avstað við øllum, men í Karim Zasa hevði OB ein sera tryggan aftasta skansa.

Annars varð vikuskiftið merkt av, at tað nú eftir øllum at døma er søga, at yrkisfótbóltur verður leiktur í Lyngby. Fyrrverandi felagið hjá Toda Jónsson hevur leingi havt fíggjarligar trupulleikar, og hóast nógvar loysnir hava verið royndar hetta seinasta árið, so ásannar eigarin av felagnum nú, at stríðið hevur verið til fánýtis.

Tað var tó ikki uttan víðari, at Lyngby segði farvæl við danskan yrkisfótbólt. Teir megnaðu nevnliga at stríða seg til javnleik móti Brøndby, og harvið hjálpa fyrrverandi eigara felagsins. Hann eitur Flemming Østergaard, og er í dag stjóri í FCK.

# Tryggur sigur til Hull

Hull City við Julian Johnsson á vøllinum í samfullar 90 minuttir vann ein tryggan 3-0 sigur, tá Oxford vitjaði á Bothferry Park leygardagin.

Øll málini komu í fyrra hálvleiki, og sum skilst var ongantíð nakar ivi um, at Hull var tað væl betra liðið.

Julian Johnsson var partur av triðja málinum hjá Hull, sum kom eftir eitt langt álop, har verjuleikari fyrst bjargaði á strikuni, og har bæði Julian og ein liðfelagi hansara raktu tvørtræið, áðrenn toppskjúttin hjá liðnum, Graham Alexander, loksins fekk beint bóltin í málið.

Við sigrinum heldur Hull fast um sessin millum play-off plássini. Bert eitt stig er upp til silvurplássið, sum hevur beinleiðis uppflytan við sær.

**-jm**

# Taptu fyri oddaliði

Súni Olsen var á vøllinum seinastu 20 minuttirnar, tá FC Zwolle í hollendsku toto-deildini var við undirlutan móti Excelsoir, sum liggur á odda í deildini.

Dysturin endaði 3-0 til heimaliðið, og við hesum er tað brádliga farið at síggja heldur svart út hjá Zwolle í royndunum at vinna sær sætið longri uppi í deildini.

Í løtuni er líkt til, at seks lið fara at berjast um tey bæði plássini undir Excelsoir, og er Zwolle niðasta av hesum seks liðum, tó at munurin teirra millum ikki er hin stóri.

Ein annar møguleiki er so, at Zwolle verður ein av sonevndu periodumeistarunum. Hetta eru liðini, sum standa seg best í hvørjum fjórðingi av kappingarárinum, og sleppa hesi eisini at dystast um pláss í bestu deildini. Ein slíkan møguleiki hevði Zwolle í vár, men tá gekk av skriðuni til seinastu dystirnar.

**-jm**

# Viðmerking frá Hondbóltsambandinum

VIÐMERKING FRÁ HSF

*Petur Ove Petersen*

Í grein í Dimmalætting herfyri varð sagt, at ógreiða er á og ongar reglur eru fyri, hvussu nógvir útlendskir leikarar kunnu vera á einum hondbóltsliði. Ávísur persónur, sum hevur verið rættiliga innarliga í Hondbóltsambandinum og hevur verið á aðalfundi hesi seinnu árini, tykist sáa iva um henda spurning.

Her skal ikki verða nomið við, hvørt tað er gagnligt ella ikki fyri føroyskan hondbólt, at útlendskir leikarar eru í føroyskum hondbólti, og hvat eitt hóskandi tal hevði verið. Hetta kunnu ymsar meiningar vera um.

Men heilt greitt er tó, at á seinasta regluliga aðalfundi í Hondbóltsambandinum var samtykt, at talið á útlendskum leikarum á føroyskum hondbóltsliði kann vera upp í 3. Reglan er sostatt heilt greið.

Tá tað í greinini eisini verður sagt, at "stór ósemja er um_.", og seinni "Tað tykist kortini ikki at vera semja millum hondbóltsáhugaði í málinum um útlendsku leikararnar....", so er hetta óivað rætt. Men munur er á hugtøkunum 'hondbóltsáhugaðum' og 'aðalfundinum í Hondbóltsambandinum'. Aðalfundurin í Hondbóltsambandinum er limafeløgini og teirra limir.

Greinskrivarin sóknast eftir, nær Hondbóltsambandið fer at taka umrødda mál til viðgerðar. Honum til kunningar skal verða sagt, at greiðar reglur eru eisini fyri, hvussu mál verða viðgjørd og samtykt í Hondbóltsambandinum. Reglan viðvíkjandi útlendskum leikarum er greið og er galdandi, til ein nýggj regla er samtykt á lógligan hátt. Ikki er heppið at broyta reglur fyri kappingar í einum kappingarári.



# Havnarmenn hølvaðu vestmenningar av

**Eftir at toppliðið úr Vestmanna taptu stórt ímóti høvuðsstaðarfelagnum er líkt til at meira spennandi verður í toppinum í 1. deild enn væntað varð.**

TALV

*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Ikki skulu telvarnir úr Havnar Telvingarfelag avskrivast. Tað prógvaðu teir so sanniliga í fjør tá teir eftir fýra umfør lógu aftastir, men kortini hálaðu seg heilt upp á fyrsta pláss tá avtornað varð. Tey fyrstu fýra umførini í ár vórðu eins og í fjør ikki góð hjá størsta og mest vinnandi talvfelagnum í Føroyum. Eitt miðalpláss og nøkur stig fram til fyrsta pláss.

Í Havn broyttist tó miðalringa kappingin hjá teimum, til nú eina realistiska jagstran eftir triða FM-heitinum á rað.

### Rødgaard koppaður

IM John Rødgaard hevur havt eina góða fyrru helvt hjá vestmannaliðnum, sum hann afturi í 1992 bleiv føroyameistari við. Í Havn bleiv hann óvæntað steðgaður av 17 ára gamla Martin Poulsen, sum av álvara er vaknaður eftir eina slaka kappingarbyrjan. John við hvíta fólkinum fekk ikki nakað stórvegis burturúr miðspælinum, og í tíðarneyðini misti hann riddara, og gavst hareftir. Martin telvaði frískt og royndi at skapa talvið við svarta fólkinum, og bleiv lønaður fyri stríðið í tíðarneyðini. Eitt talv sum uttan iva gevur framhaldandi íblástur til Martin. Talvið er við í blaðnum.

Vinnarin av HT-Open herfyri Olaf Berg, mundi koppað Torbjørn Thomsen, men javnleikur bleiv úrslitið, sum Olaf als ikki skal vera ónøgdur við. Herluf Hansen heldur fram við góða stimanum og vann sítt talv, eins og Andrias Ziska gjørdi á fjórða borði hjá Havnarliðnum. Teir vunnu ávíkavist á John Jacobsen og Kára Durhuus. Hetta var fyrsti sigurin hjá Andrias Ziska í ár, og møguliga eitt neyðugt lyft til fyrrverandi føroyameistaran.

Sostatt ein 3,5 — 0,5 stórsigur til havnarmenn, sum viðførir at teir eru á einum øðrum plássi bert hálvt stig aftanfyri klaksvíkingar.

### Góðir kollfjarðaunglingar

Berandi kreftirnar á besta liðnum úr Kollafirði eru tveir unglingar, 18 ára gamli Hans Kristian Simonsen og 17 ára gamli Eyðálvur Johannesen. Báðir vunnu síni talv ímóti klaksvíkingum í vikuskiftinum. Kollfirðingar fingu tó ikki fleiri stig í hesum dysti sum tískil endaði 2-2.

Hans Kristian vann eitt óvanliga vilt talv ímóti tí álopsfýsna Ólavi Simonsen. Talvið kundi fara báðar vegir, og sjálvt um kongurin hjá Hans Kristian meginpartin av talvinum stóð mitt á borðinum varð tað hann sum loksins vann. Hans Kristian tykist ikki at kunna steðgast.

Eyðálvur gjørdi ikki minni bart tá hann vann á Rana Nolsøe, men sigrar hjá Steintóri Rasmussen og Tummas M. Anthoniussen á ávíkavist Niclas M. Joensen og Hans P. Joensen, bjargaðu dystin hjá klaksvíkingum. Teir eru enn fremstir í fremstu deildini, men skulu vænta harða kapping frá serliga havnarmonnum og vestmenningum.

### Hvalvíkingar úr botninum

Í Havn hittust HT2 og talvfelagið úr Hvalvík, og hendan dyst vunnu hvalvíkingar 3,5 — 0,5. Eftir hetta úrslit verður sera tungt hjá havnarmonnum at bjarga annað liðið frá niðurflyting. Enn einaferð varð tað Jógvan Næs sum fekk hálað stig til havnarliðið. Jógvan og Bergur Magnussen leikti javnt á fjórða borði. Martin Brekká og Sámal Christiansen vunnu trygt á ávíkavist Jóhan Gaard og Johan E. Hansen, meðan Finnbjørn Zachariassen mátti berjast leingi fyri sigrinum ímóti Óla Joensen.

### Støðan eftir fyrru helvt

| | |
|---|---|
| KTF | 12,5 |
| HT | 12 |
| VT | 11 |
| KT | 9,5 |
| TFS | 9 |
| HT2 | 6 |

Telvarar hava nú jólafrí frá liðkappingini. Sætta umfar verður leikt 12. januar og tá hittast KTF — TFS, HT2 — HT og VT — KT.

### Toftamenn økja um leiðsluna

Við 3,5 — 0,5 sigri á nærmastu kappingarneytunum úr Runavík eru toftamenn hálvtannað stig fremstir í 2. deild. Sandavágsmenn tóku runavíkingar aftur og liggja nú á øðrum plássi eftir somuleiðis 3,5 — 0,5 sigur klaksvíkingum. Í botinum vunnu vestmenningar á gøtumonnum, men kortini liggja vestmenningar á aftasta plássi nú kappingin er komin í helvt.

HT3 í 3. deild hava lagt sjógv ímillum teir og hini liðini. Við eitt nú royndum telvarum sum Súna Ziska og Súna Jacobsen á liðnum er tað ei heldur óvæntað at teir hava tikið trygga leiðslu. Sandavágsmenn og HT4 liggja javnir á øðrum plássi, hálvttriðja stig aftanfyri HT3.

# Talvið hesa vikuna

**IM John Rødgaard (2315) – Martin Poulsen (2085)**
**Liðkappingin (5), 02.12.2001**

1.Rif3 d6 2.d4 g6 3.c4 Bg7 4.Ric3 Rid7 5.e4 e5 6.Be2 Rigf6 7.0-0 0-0 8.Fc2 exd4 9.Rixd4 Re8 10.Rd1 Ric5 11.f3 a5 (Neyðugt er at steðga b4) 12.Ridb5 Bd7 13.Be3 Bxb5? (Heldur óneyðugt. Eitt nú Rie6 hevði helst verið betur)
14.cxb5 Fd7 15.Bc4 Rac8 16.Bg5 Rie6 17.Bh4 c6 (Hesin leikur ger svørtu d-finnuna veika, men hinvegin er svarta støðan somikið lukkað at kanska c6 nettupp er besta loysnin) 18.bxc6 bxc6 19.Kh1 (Fd2 betri) Ric5 20.Bf1? (Alt ov passivt. Fd2 og trýsta á d-finnuna er upplagt) 20...Fc7 21.Rac1 Fb8 22.b3 Red8 23.Rib1 (Svartur kemur nærum fyri seg, eftir at hvítur hevur leikt ov nógvar passivar leikir í annars góðu støðuni) 23...Rie6 24.Fd2 (Nú er nakað seint...) 24...d5 (sjálvandi skal d5 roynast) 25.exd5 Rxd5 26.Fe1 g5 27.Bg3 (Sjálvt um svartur hevur fingið opna støðuna, hevur hvítur enn fyrimun. Tíðaneyð ávirkar tó nógv spælið, skal leggjast aftrat) 27...Rif4 28.Ric3 Re5 29.Ff2 [29.Bxf4 helst betur] 29...Ri6h5 30.Rie4 h6 31.Bc4 Rd8 32.Bxf4 Rixf4 33.g3 Rie6 34.Bf1 c5 35.Bg2 Rid4? 36.f4? [36.Rxc5 og hvítur hevur fyrimun. eftir leikta leik fær svartur betri spæl] 36...gxf4 37.gxf4 Rf5 38.Rf1 Rie6 39.Fg3 Rxf4 40.Rif6+??



(Týpiskur feilur í leiki nummar 40, tann seinasti í tíðarneyðini) 40...Rxf6 41.Fh4 [41.Rxf6 Fxg3 42.hxg3 Bxf6] 41...Rd4 (Tíðarneyðin er av, og svartur hevur mann meir)
0-1
eftir 40.Rif6+

# Karpov útsligin

Anatoly Karpov, sum eftir ætlan skuldi saman við Kasparov og Kramnik luttaka í Botvinnik Memorial, valdi óvæntað at venda eygini ímóti heimsmeistaraheitinum hjá talvsamgonguni FIDE, sum eins og Botvinnik Memorial verður leikt í Moskva. Karpov hevði annars í summar kritiserað FIDE og HM teirra, men valdi hann kortini at royna at fáa FIDE HM-tittulin aftur til Russland.

Tíverri fyri Karpov tapti hann longu í fyrsta umfari ímóti ókendum kinesara við styrkistalið 2487. Hetta úrslit er sjálvsagt óhoyrt og óvæntað. Mannagongdin er at telvað verður tvær reisir ímóti hvørjum øðrum, og stendur javnt tá verður kviktalvsumdystur leiktur fyri at finna vinnaran. Karpov tapti kviktalvsumdystin.

Núverandi FIDE HM, indarin Anand, er saman við øðrum favorittum so sum Adams, Morozevich, Ivanchuk, Topalov og Shirov, komin víðari til fjórða umfar. Eisini er Predrag Nikolic, sum miðskeiðis í 90´unum var mangar ferðir í Føroyum, serliga í Klaksvík, har hann vandi ungir telvarar, komin víðari í Knock-Out HM-kappingini Eftir fjórða umfar er fjórðingsfinala.

**-cens**

# Kasparov og Kramnik javnir

Í Moskva verður í hesum døgum áhugaverdur dystur millum Garry Kasparov og Vladimir Kramnik leiktur. Hetta er toppurin av heimselituni, og nógv stendur tískil uppá spæl. Hetta stóra talvtiltak nevnist Botvinnik Memorial, eftirsum russin og fyrrverandi heimsmeistarin Mikhail Botvinnik hevði verði 90 ár í ár.

Kasparov og Kramnik skulu fyrst leika fýra vanlig langtalv, síðani seks kviktalv og seinast ein snartalvsdyst uppá tíggju talv. Tvey talv eru telvd, og støðan er 1-1 eftir tveir javnleikir. Kramnik hevði hvíta fólkið í fyrsta talvinum, men bjóðaði Kasparov javnleik eftir bert átjan leikir. Sjálvt Kasparov er nøgdur við javnleik við svørtum ímóti Kramnik, og tók hann tí av. Næsta talvið bleiv sera áskoðaravinarligt, har Kasparov fekk fyrimun eftir byrjanarspælið. Kramnik hevur óvanligar verjueginleikar, og enn einaferð eydnaðist honum at bjarga sær frá tapi. Hann fekk enntá fyrimun, men Kasparov fekk javleikin í hús eftir eitt drúgvt talv. Triðja talvið verður leikt í dag, týsdagin.

**-cens**